gult cyan magenta svart



# Kundi ikki veri betri

*Føðingardagsbarnið, Jens Kristian Hansen, var fegin um gávuna frá systkinabarninum, Øssi Hansen*

Jákup Mørk

Tað var ein fegin føroyskur liðformaður, sum eftir dystin takkaði fyri seg á hesum sinni. Leiðin gekk til aftur til Havnar, har hann saman við familjuni skuldi fáa sær ein góðan bita.

Spurdur um hann var nøgdur við føðingardagsgávuna, sum liðfelagarnir høvdu givið honum, svaraði liðformaðurin, at tað var hann so avgjørt.



*Á 29 ára degnum fekk Jens Kristian eina ógloymandi føðingardagsgávu frá liðfeløgum sínum*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

- Hatta var góð gáva, og tað so ikki hendi fyrr enn móti endanum av dystinum gjørdi bara alt nógv stuttligari. So slapp man eisini undan at hoyra hasi niðursetandi orðini sum »fisherman« og »go back to fish«, sum meira enn eina ferð komu frá slovensku leikarunum, helst Jens Kristian heldur speiskliga fyri.

Um dystin sjálvan helt hann annars, at fyrri og seinni hálvleikur vóru sum dagur og nátt.

- Fyrri hálvleikur var als ikki góður frá okkara síðu. Vit fingu ongantíð fatur á slovensku leikarunum, sum fluttu seg sera væl, og veruliga sýndu, hvussu góðir teir eru.

Í seinna hálvleiki fingu vit tó nógv betur fatur á teimum, og sjálvur haldi eg, at vit meira ella minni dominera seinna hálvleikin.

Men mistu tit ikki mótið, tá teir so koma upp á 2-0?

- Jú, tað var rættuliga deprimerandi. Teir eru so at siga púra ófarligir, og so fáa teir ein møguleika, tá Kurt og misskilja hvønn annan. Verjuleikarin hjá teimum sá ikki so mikið sum út til at avlevera bóltin, men sparkið hjá honum spældi so ein áleypara frían. Tíbetur megnaðu vit kortini at reisa okkum, so alt í alt varð talan um ein góðan dag.

**Hugsar ikki um mótstøðuna**

Undir dystinum hevði Jens Kristian annars til uppgávu at verja størstu stjørnuna á slovenska liðnum, Zlatko Zahovic.

Um hetta hevði ávirkan á spæl hansara, segði Jens Kristian, at tað hevði tað ikki.

- Tað er fullkomuliga líkamikið, hvør beinleiðis mótstøðuleikarin er. Tað er so ikki nakað, sum eg hugsið serliga nógv um undan einum dysti, svaraði hann.

Út frá hesum seinasta kann so staðfestast, at føroyska landsliðið veruliga hevur lært nakað seinastu 10 árini. Í hvussu er er líkt til, at ovurhonds stóra virðingin fyri mótstøðumonnunum er burtur, nú 10 ára dagurin fyri sigurin á Eysturríki nærkast.


Marknaðar samskipari
..til TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR



marknaðarføring
produktir
tænastur

**Tryggingarfelagið Føroyar søkir eftir einum fólki til áhugavert starv á Marknaðardeildini.**

***Starvið***
Arbeiðsuppgávurnar eru fjølbroyttar og avbjóðandi, og fevna bæði um innanhýsis marknaðarføring og uttanhysis marknaðarføring av produktum og tænastum felagsins.

***Førleiki***
Vit vænta:
- at tú hevur útbúgving innan marknaðarføring frá hægri handilsháskúla ella líknandi, og/ella praktiskar royndir innan marknaðarføring
- at tú hevur góðan teldukunnleika og dámar væl at arbeiða við kreativum uppgávum
- at tú arbeiðir sjálvstøðugt og dámar væl nýggjar avbjóðingar
- at tær dámar væl at samstarva, og dugur væl at orða teg í skrivt og talu

***Sjálvstøðugt og avbjóðandi***
Vit bjóða eitt sjálvstøðugt starv við góðum møguleikum fyri bæði persónligari og fakligari menning.

Starvið verður sett sambært sáttmála millum Yrkisfelagið Trygdin og AFF.

***Umsókn***
Umsóknir, saman við prógvum og viðmælum, skulu verða Starvsfólkadeildini í hendi í seinasta lagi 25. september 2000.
Nærri upplysingar um starvið fáast við at venda sær til Henry Olsen, deildarstjóra, á telefon 345 509 ella 211 715.

SANSIR · TEL 355 355

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR
*The Faroe Insurance Company*

Kongabrúgvin
P.O.Box 329
FO-110 Tórshavn
Faroe Islands

Tel +298 345600
Fax +298 345601
tf@trygging.fo
www.trygging.fo


# Kanska er tað álvarsligt

*Todi Jónsson noyddist skaddur av vøllinum, og tað tykist óvist, nær hann verður klárur aftur til at spæla*



*Hóast góða úrslitið, harmis Todi Jónsson um skaðan, sum hann fekk í lærið*
*Mynd: Álvur Haraldsen*



## ... kanska er tað álvarsligt

Jákup Mørk

Hóast týdningarmikla stigið móti Slovenia, so tóktist lagið á Toda Jónssyni ikki at vera tað besta eftir dystin sunnudagin. Orsøkin til hetta var skaðin, sum noyddi Toda av vøllinum, tá seinni hálvleikur var um at verað hálvrunnin.

**Gamal skaði**

Talan er um lærið, sum Todi áður hevur havt trupulleikar við, og líkt er til, at talan hesu ferð er um eina sonevnda fipurspreinging.

Júst, hvussu leingi hann ikki fær spælt, tykist óvist í løtuni. Er talan um eina vanliga fipurspreinging, er helst neyðugt at binda frið í einar tríggjar til fýra vikur, men tað kunnu eisini gerast einar átta vikur, um heilt illa vil til.

Tað var undir einum spurti móti slovenska málinum, at skaðin breyt upp, og Todi tóktist ongantíð í iva um, at nú var galið.

Todi hevur onkuntíð áður fingið skaðar, tá hann hevur spælt við landsliðnum, og eftir dystin sunnudagin ásannaði hann eisini, at hetta vóru tung boð at hava niður aftur við sær.

- Tað verður ikki serliga stuttligt at skula greiða teimum frá støðuni, men vónandi hálpir tað eitt sindur, at vit fingu eitt gott úrslit, var svarið, tá hann varð spurdur um hetta.

Vónandi hevur hann rætt í hesum, og fyri føroyskan fótbólt er so avgjørt at vóna, at tað ikki ganga alt ov nógvar vikur, fyrr enn skjóti framherjin aftur er tøkur hjá Allani Simonsen.




RIMMAR TILBOÐ

10-ára garanti
**Ahorn parkett**
**3 stav**
14x200x2000 mm.
Lakkerað 516,-
Olja 572,-

10-ára garanti
**Ask parkett**
**3 stav**
14x200x2000 mm.
Lakkerað ~~438,-~~
**TILBOÐ 388,-**
Olja 478,-



**TILBOÐ** Laminat Professional 11000
Eik-Bók-Ahorn-Kirsuber-Merbau
10 ára garanti *Spar 40,-*
**BERT 159,-**

10-ára garanti
**Bók parkett**
**3 stav**
14x200x2000 mm.
Lakkerað ~~338,-~~
**TILBOÐ 298,-**
Olja 398,-

10-ára garanti
**Eik parkett**
**3 stav**
14x200x2000 mm.
Lakkerað ~~338,-~~
**TILBOÐ 298,-**
Olja 398,-

10-ára garanti
**Merbau parkett**
**3 stav**
14x200x2000 mm.
Lakkerað 396,-
Olja 490,-

10-ára garanti
**Birk parkett**
**3 stav**
14x200x2000 mm.
Lakkerað 448,-

10-ára garanti
**Kirsuber parkett**
**3 stav**
14x200x2000 mm.
Lakkerað 490,-

Profa Farvur
**Á Hálsi, Tórshavn** Tel. 31 92 20
**Tvøroyri** Tel. 37 10 81
**Saltangará** Tel. 44 91 49

Sosialurin - 311820






**hevur føðingardag**

**Í komandi viku ferðast hann runt og vitjar sparikassadeildirnar eftir hesi skrá:**

| Dagur | Kl. | Deild |
|---|---|---|
| Týsdagur 5/9 | 12.30-13.30<br>13.45-14.45<br>15.00-16.00 | Sørvágur<br>Miðvágur<br>Sandavágur |
| Mikudagur 6/9 | 12.30-13.30<br>13.00-14.00<br>13.45-14.45<br>14.30-16.00<br>15.00-16.00 | Skálavík<br>Hvalba<br>Sandur<br>Tvøroyri<br>Skopun |
| Hósdagur 7/9 | 14.00-17.00 | Sverrisgøta, Tórshavn |
| Fríggjadagur 8/9 | 12.30-13.30<br>12.30-13.30<br>13.45-14.45<br>13.45-14.45<br>15.00-16.00 | Gøta<br>Strendur<br>Fuglafjørður<br>Skála<br>Runavík |

**Um tú fert inn í eina deild at tøma Spari-Bassan í komandi viku, ført tú eina spennandi gávu frá Føroya Sparikassa.**

FØROYA SPARIKASSI